# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Ása fer við sorgblídni

**Ása Poulsen hevur sagt farvæl sum leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur á Landssjúkrahúsinum**

FRÁFARINGARHALD
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Ása Poulsen hevur sagt farvæl sum leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur á Landssjúkrahúsinum*

Fráfaringarhald var á Medisinska deplinum á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin í sambandi við at Ása Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur á Medisinska deplinum, nú gevt í hesum starvi.

Ása varð útbúgvin sum sjúkrarøktarfrøðingur í 1977. Hon byrjaði at arbeiða á B8 beinanvegin og var har til 1997, burtursæð frá einum ári har hon var uttanlands á leiðsluskeiði og gott ár á hjartadeild á Ríkssjúkrahúsinum. Síðan var hon freelancari í gott fýra ár, har hon m.a. arbeiddi í Grønlandi og Norra og her heima. Frá 2001 hevur hon verið leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur á medisinska deplinum.

Orsøkin til at Ása hevur sagt seg úr starvi eru ikki ókend. Hon hevur alment gjørt vart við, at hon kann ikki liva við umstøðunum á seingjadeildunum, hon hevur ábyrgd av B6, B7 og B8 eru akuttar medisinskar deildir og kjarnuuppgávan er diagnostisering, viðgerð, røkt og rehabilitering av medisinskum sjúklingum. Starvfólkini eru og verða eisini ment fakliga til hesar seruppgávur.

Frá tíðliga í heyst hava tey havt nógvar liðugt viðgjørdar sjúklingar, teir flestu røktarsjúklingar, sum hava tørv á røktarheimsplássum. Tað er ofta, at tað ikki er pláss til akuttu sjúklingarnar, og hesir enda úti á gongini. Ofta mugu tey útseta planlagdar innleggingar hjá sjúklingum, sum áttu at verið innlagdir til ymiskar kanningar vegna plássmangul.

Tað kann ikki vera rætt, at akuttu medisinsku deildirnar B6, B7 og B8 verða brúktar til røktarheim hjá kommununum. Aðrastaðni gjalda kommunurnar til sjúkrahúsini fyri liðugt viðgjørdur sjúklingur, um kommunan ikki hevur stovnspláss tøkt. Slíka skipan áttu vit eisini at havt í Føroyum, sigur Ása.

Hagtøl vísa, at vit gerast eldri, og tað verður tørvur á fleiri akutt medicinskum seingjaplássum, og nógv fleiri røktarheimum. Harumframt er stórur mangul á ymiskum tólum á medisinska deplinum, so m.a. serlæknarnir kunnu diagnostisera sjúklingar.

Undir fráfaringarhaldinum vóru fleiri talur hildnar, og starvsfelagar takkaðu Ásu fyri tíðina. Ása segði m.a. í sínari røðu, at hennara persónliga ynski er, at játtan verður sett av til eitt nýtt Landssjúkrahús, sum eisini verður ein granskingarstovnur.

Annars sigur hon, at tað er við sorgblídni, at hon fer. Arbeiðið hevur verið sera áhugavert, við nógvum avbjóðingum. Hon hevur trivist væl, har eru nógv dugnalig starvsfólk við nógvum ymiskum kompetansum, sum øll royna at gera tað besta fyri sjúklingin. Samstarvið er gott og Landssjúkrahúsið er eitt gott arbeiðspláss, sigur Ása og takkar fyri tíðina.

Starvið hjá Ásu verður lýst leyst, men fyrstu tríggjar mánaðirnar verður tað Ingunn Gaardbo, sum kemur at røkja starvið.

*mg*



*Starvsfelagar siga farvæl*



*Ása og Odmar Færø, yvirlækni*



*Ingunn Gaardbo h.m. kemur at røkja starvið hjá Ásu fyrstu tríggjar mánaðirnar*

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri telegramm, gávur,
blómur og uppringingar, og takk øll, sum
komu til mín 70 ára føðingardag
- uttanlands og innanlands.
Takk fyri alla hjálp og ein serlig tøkk til
Manskórið fyri vakran sang.
Hjartalig tøkk øll somul.

**Vinarligar heilsanir**
**Finnbogi við Gjónna**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæri maður, pápi, verfaðir, abbi, sonur og beiggi

**Hans Súni Joensen**
Leirvík

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk fyri kransar og heilsanir.
Tøkk til Regin fyri vitjanir, meðan hann lá sjúkur, og fyri troystarrík orð í heiminum og í kirkjuni.
Tøkk tit øll, sum komu inn á gólvið við troystarríkum orðum.
Takk til Una Næs fyri vitjanir og troystarrík orð í heiminum og kirkjuni.
Tøkk til heimasjúkrasystrarnar, sum gjørdu tað møguligt hjá honum at vera heima, við at vera um hann bæði dag og nátt.
Tøkk til tykkum øll, sum bakaðu.
Tøkk til tykkum, sum hjálptu til við ervinum, bæði við at kokkast og servera.
Takk til kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Takk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til seinasta hvíldarstaðin.
Orð eru so fátøk, men túsund takk øll somul.

*Familjannar vegna*
**Hallbjørg, Jan, Katrin, Bruno og Jansy Elisabeth**

**90 ára føðingardagur**
Miebeth Jacobsen av Kirkju, búsitandi á Sambýlinum á Heygnum, undir Kráarbrekku, Klaksvík, fyllir 90 ár í dag, 1. apríl. Høvi verður at heilsa upp á hana á Sambýlinum frá kl. 15 til 18.

**Dagurin**
**1. apríl. Hugo**, deyður í 1132. Biskupur í Grenoble í Fraklandi. Týskt navn, sum merkir tann skilagóði ella vísi. Sama veðrið, sum var fyrsta apríl, skuldi verða síðsta apríl. Ein kona helt fyri: Sum hann prílar inn, prílar hann út. Nyholm Debess doyði hendan dagin í 1952, og Óla Jákup í Horni (O.J.Hansen), komponistur, var føddur hendan dagin í 1885 í Kirkjubø.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*